## Riis droppar Tour de France

Orsakað av tí nógvu umrøðuni, sum hevur verið runt um eigaran av danska súkklufelagnum, Team CSC, síðstu tíðina, hevur Bjarni Riis nú tikið avgerð um, ikki at standa á odda fyri liðnum, nú størstu súkklukapping á árinum, Tour de France, liggur fyri framman. – Síðsta tíðin hevur tikið hart uppá meg persónliga, og eg má viðurkenna, at eg ikki júst nú havi kreftirnar, sum skulu til, fyri at standa á odda fyri einum liðið undir Tour de France í tríggjar vikur, sigur Riis í einum tíðindaskrivi frá felagnum.



## Tour de France av bakkastokki

Leygardagin fer størsta súkklukapping um árið av bakkastokki, tá teir 189 súkklararnir úr 21 ymiskum feløgum fara at traðka í pedalurnar. Fyri fyrstu ferð nakrantíð byrjar Tour de France í London, tá tann sokallaði prologurin verður koyrdur í miðbýnum av enska høvuðsstaðnum. Hetta verður harafturat árið, har áhugaði fyri ítróttinum vóna at sleppa undan dopingspøkilsinum, sum hevur sett ein myrkan skugga yvir kappingina seinastu nógvu árini.

# Skála kærir avgerðina

**Skála hevur gjørt av at kæra avgerðina hjá aganevndini hjá Fótbóltssambandinum víðari til yvirkærunevndini. Hetta sigur formaðurin, Hans Jákup Andreasen**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Fyrr í ár gjørdi B36 av at senda eina klagu inn til fótbóltssambandið eftir ein dyst í Gundadali, har Skála hevði verið á vitjan. Grundin til klaguna var, at Skála hevði sent Slavisa Kaplanovic á vøllin seint í dystin, sjálvt um hesin ikki stóð á dómaraseðlinum.

Væntandi var, at aganevndin hjá Fótbóltssambandinum fór at geva Skála eina átælu ella eina bót, men soleiðis var ikki. Fyrr í vikuna kom aganevndin við sínum úrskurði, og hon dømdi B36 at vinna dystin við úrslitinum 0-0. Sostatt stendur Skála til at missa stig-ið, sum teir annars fingu í 1-1 javnleikinum í Gundadali, meðan hvíta árstalsfelagið úr Havn stendur til at fáa tvey stig afturat.

Málið er tó ikki komið at enda, tí formaðurin í Skála, Hans Jákup Andreasen, sigur, at teir fara at kæra málið víðari til yvirkærunevndiniá, har teir vóna at fáa avgerðina hjá aganevndini broytta.



*Skála hevur valt at kæra avgerðina, sum aganevndin hjá Fótbóltssambandinum kom fram til. Hetta er ikki rætt, og tí føla vit okkum noyddar at fara víðari við hesum máli, sigur formaðurin í Skála Hans Jákup Andreasen.*

### - Hetta er ikki rætt

Tá vit fingu orðið á formannin hjá Skála í gjárkvøldið, segði hann, at felagið fór at kæra málið víðari til yvirkærunevndina.

- Ja, vit fara at kæra víðari. Vit kunnu ikki tapa dystin, tí hetta er ikki rætt. Maðurin, sum kom inn í dystin ímóti B36, var í sínum fulla rætti at spæla dystin. Hann hevði spælt undanfarnu seks dystirnar fyri Skála, spæliloyvi var í lagi og hann hevði ikki leikbann. Tað var bert ein menniskjansligur feilur, sum førdi við sær, at maðurin ikki stóð á dómaraseðlin-um, og tí føla vit okkum noyddar at fara víðari við hesum.

Tað eru annars fleiri ting frá hesum dystinum, sum undra formannin hjá Skála.

- Hví slapp hesin maðurin inn í dystin? Og hví slapp hann yvirhøvur at vera á beinkinum, um hann ikki stóð á dómaraseðlinum? Hesi tingini skilji eg ikki rættiliga, sigur Hans Jákup Andreasen.

### Sjálvandi skal slíkt ikki henda

Sjálvt um Hans Jákup ikki er samdur við avgerðina hjá aganevndini, so merkir hetta tó ikki, at hann ikki heldur, at Skála eigur at sektast fyri feilin, sum bleiv framdur í Gundadali.

- Sjálvandi skulu slíkir ikki koma fyri. Men sum sagt, hetta kann henda, og eg haldi ikki, at avgerðin hjá aganevndini er røtt. Vanligt hevur verið, tá slíkir feilir henda, at felagið fær eina átalu ella eina bót, og tað haldi eg, at felagið eisini skuldi fingið í hesum føri, sigur formaðurin hjá Skála.

At enda leggur hann afturat, at Fótbóltssambandið skuldi fara at umhugsa at broytt mannagongdina í samband við dómaraseðlarnar, so hon fer at líkjast henni, sum verður nýtt í Evropa.

- Ja, eg haldi heilt víst, at Føroyar skuldu broytt mannagongdina í samband við dómaraseðlarnar, soleiðis at hvørt lið hevur ein dómaraseðil við, tá tað kemur til dyst, soleiðis sum tað verður gjørt í altjóða fótbólti.

# NSÍ og EB/Streymur standa sum taparar

**3- Avleiðingarnar av einum mistaki eiga at samsvara við sjálvt mistakið og raka tann, ið hevur framt mistakið. Hetta segði formaðurin hjá NSÍ, Dánial Petur Hansen, í lesarabrævið í Sosialinum í gjár. Við hesum meinar hann, at úrskurðurin hjá aganevndin eisini rakar feløg, sum slett ikki hava nakað við málið at gera**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Eftir úrskurðin hjá aganevndini hjá Fótbóltssambandinum í málinum um dystin millum B36 og Skála sendi formaðurin hjá NSÍ, Dánial Petur Hansen, í gjár eitt lesarabræv til Sosialin, har hann m.a. vísir sína ónøgd við avgerðina hjá aganevndini.

Fyrst og fremst heldur Dánial Petur, at avgerðin hjá aganevndini ikki bert er skeiv, men fullkomiliga burtur úr vón og viti, sum hann tekur til í lesarabrævinum. Hann sigur víðari, at fótbóltsúrslit fyrst og fremst eiga at vera avgjørd á vøllinum, og ikki av hendingaligum, ótilvitaðum og sakleysum manglum í samband við útfylling av einum dómaraseðli, sum tað hevur gjørt í hesum førinum.



*NSÍ og EB/Streymur standa í løtuni sum taparar av einum máli, sum tey uppunaliga einki hava við at gera.*

### Avgerðin rakar skeivt

Um vit venda okkum til sjálvt málið og ikki úrskurðin hjá aganevndini, so heldur Dánial Petur, at sjálvandi skal slíkt ikki koma fyri, sum hendi í dystinum í Gundadali millum B36 og Skála.

- Nei, tílík mistøk skulu sjálvandi ikki koma fyri, og tí skulu tey heldur ikki góðtakast. Eg haldi, at felagið, sum hevur gjørt mistakið, eigur at verða sektað við hóskandi avleiðing í mun til mistakið, sigur formaðurin í NSÍ.

Dánial Petur heldur tó ikki, at avleiðingin av mistakinum í hesum føri er hóskandi.

- Avleiðingin av einum mistaki eigur at samsvara við sjálvt mistakið og raka tann, ið hevur framt mistakið – og ikki onnur - og tað haldi eg ikki, at avleiðingarnar gera í hesum føri.

- Eg haldi, at avgerðin hjá aganevndini m.a. rakar bæði NSÍ og EB/Streym, sum liggja og kappast við B36 í oddastríðnum í Formuladeildini, tí brádliga fær B36 tvey stig á skrivaraborðinum, sum eingin hevði væntað, at teir fóru at fáa. Tí meti eg, at úrskurðurin hjá aganevndini ikki bert rakar Skála, sum í hesum føri hevur framt mistakið, men eisini B36, NSÍ og EB/Streym, sigur formaðurin hjá NSÍ.

Hann leggur tó stóran dent á, at hann ikki heldur, at B36 við kæruni hevur roynt at tiltuskað sær nøkur stig í oddinum.

- Eg eri sannførdur um, at orsøkin hjá B36 til at kæra ikki hevur verið tann at tiltuska sær nøkur stig, sum ikki eru uppiborin, men hinvegin tann at tryggja sær, at Skála fær ta neyðugu átaluna, soleiðis at felagið ikki ger sama mistakið einaferð afturat.

Dánial Petur Hansen heldur sum heild, at avgerðin hjá aganevndini er sera óheppin, og hann vónar at enda, at yvirkærunevndin fer at broyta avgerðina hjá aganevndini, tí hetta metir hann vera tað besta fyri fótbóltin í Føroyum. Serliga tí at feløg, sum hava framt slík mistøk síðstu árini, ikki hava verið sektað við at tapa dystin, men hinvegin hava fingið eina átalu ella ei-na bót, sum samsvarar við tað mistak, sum felagið hevur framt.